# Jón Rói gjørt sáttmála við Frem

**Føroyski landsliðsleikarin, Jón Rói Jacobsen, hevur í vikuni skrivað undir eitt ára sáttmála við danska felagið, Frem BK, ið júst eru fluttir niður í donsku 1. deildina**

FÓTBÓLTSSÁTTMÁLI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú er greitt, at enn ein føroyskur landsliðsleikari verður í næstbestu donsku fótbóltsdeildini eftir summarsteðgin. Jón Rói Jacobsen skrivaði nevnliga fyrr í vikuni undir sáttmála við Frem BK, sum í farna kappingarári endaði næstaftast í suparligaini, og harvið rykti niður í 1. deild.

Gunnar eisini nýggjan sáttmála

Venjarin hjá Frem, Ebbe Skovdahl, var herfyri í Føroyum eitt vikuskifti og hugdi eftir dystinum millum HB og KÍ í Havn, og tá hava Skovdahl og HB óivað eisini tosað um júst Jón Róa, ið, hóast hann ikki hevur leikt í havnarfelagnum síðani 2002, framvegis var sáttmálabundin við havnarfelagið. Nú hava HB og Frem so gjørt eina avtalu, og Jón Rói hevur undirskrivað ein eitt ára sáttmála við keypmannahavnarfelagið.

Eisini evnaríki málverjin, Gunnar Nielsen, ið hevur vart unglingamálið hjá Frem seinasta árið, hevur fingið nýggjan sáttmála við danska felagið. Harafturat hevur Frem sloppið sær av við annan av fyrstaliðsmálverjunum hjá sær, soleiðis at Gunnar Nielsen nú er annar málverji hjá besta liðnum hjá Frem. Gunnar Nielsen hevur annars verið til royndarvenjingar í Liverpool, og nógv bendi á, at enska stórfelagið var áhugað í at fáa hann til felagið, men enn er so einki spurt burtur úr tí.



*Føroyski landsliðsleikarin, Jón Rói Jacobsen, hevur skrivað undir eitt ára sáttmála við danska felagið Frem, ið júst er flutt niður í næstbestu donsku deildina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Atlantic Airways Tórshavn Marathon

**Bragdið bjóðar rennarum úr Føroyum og útlondum til Atlantic Airways Tórshavn Marathon leygardagin 17. juli 2004. Fyrsta marahtonrenningin var síðsta summar og hepnaðist sera væl.**

TÓRSHAVN MARATHON
*17. juli 2004*

### Eisini 1/2 marathon og stuttleikarenning

Eisini verður møguligt at luttaka í hálvmarathon (21,1 km) og stuttleikarenning fyri vaksin og børn. Stuttleikarenningarnar verða tvær, ávikavist 5,8 km og 3 km.

Við stuttleikarenningini er ætlanin at fáa flest møgulig út at røra seg hendan dagin uttan at seta serlig krøv til skjótleika ella tíðir. Endamálið er at hava tað stuttligt og at seta ein serligan dám á miðbýin henda dagin.

Heðin Mortensen, ÍSF forseti, setur marathontiltakið og letur startskotið ganga.

### FM-kapping í marathon

Marathon-renningin er samstundis kapping um FM heitið, og teir rennarar, sum kappast um hetta heiti, skulu verða limir í einum av feløgunum fyri frælsan ítrótt í Føroyum.

### Start og mál

Marathon og hálvmarathon byrja ávikavist kl. 1400 og kl. 15.00 í miðbýnum og enda sama stað í miðbýnum. Stuttleikarenningin fyri vaksin byrjar samstundis sum hálvmarathon. Stuttleikarenningin fyri børn byrjar kl. 15:05.

### Rutan

Allar kappingarnar byrja og enda í miðbýnum. Runnið verður fyrst 5,8 km runt í Havnini. Síðan verður runnið móti Kaldbak og aftur til Havnar, fram við Strond. 1/2 Marathon-rennarar venda áðrenn Sundsverkið. Marathon-rennarar venda í Kaldbak. Allar rutur eru uppmáldar sambært AIMS reglur. Kort yvir allar ruturnar síggjast á heimasíðuni: www.torshavnmarathon.com

### Luttøkutreytir

Fyri at renna marathon skal ein hava fylt ella fylla 18 ár í ár, og fyri hálvmarathon er markið 16 ár, samstundis er miðvís marathonvenjing sjálvandi eisini ein fortreyt. Stuttleikarenningin er fyri øll og er býtt sundur í tveir bólkar. Upp til 12 ár renna 3 km, 13 ár og eldri renna 5,8 km.

### Luttøkugjøld

Marathon luttøkugjaldið er 250 kr., 1/2 marathon 200 kr., stuttleikarenning 5,8 km 100 kr. og stuttleikarenning 3 km fyri børn 50 kr. Aftaná 10. juli hækkar gjaldið við 50 kr.

### T-shirt

Íroknað luttøkugjaldið í øllum bólkum er ein marathon-T-shirt og ymiskt at drekka og eta á rutuni og í máløkinum

### Marathon-veitsla

Allir luttakarar í marathon og 1/2 marathon kunnu melda seg til sigursdøgurða, sum verður leygarkvøld kl. 21.00. Makar eru vælkomnir við.

### Tilmelding og gjald

Tilmelding kann gerast beinleiðis á heimasíðuni: www.torshavnmarathon.com.

Luttøkugjaldið skal flytast á kontu í Føroya Banka 6460-168.118.6.

Gjaldast má beinanvegin í sambandi við tilmelding.

Tilmeldingarfreistin er 16. juli, men vit heita á allar luttakarar um at melda til í góðari tíð, soleiðis at fyrireikararnir betri kunnu fyrireika tiltakið.

### Heintan av startnr.

Allir rennarar mugu heinta startnr., T-shirt o.a. í Høllini á Hálsi fríggjakvøldið tann 16. juli kl. 19-22. Eisini verður møguligt at heinta startnr. í miðbýnum leygardag fyrrapart kl. 10-12.

### Pastaparty

Fríggjakvøldið millum kl. 19-22 er pastaparty fyri øllum luttakarum í kantinuni á Hálsi í sambandi við útflýggjan av startnummari o.ø.

### Heiðran

Allir luttakararnir, sum koma á mál, fáa marathon heiðursmerki frá Føroya Sparikassa. Vinningar verða flogseðlar frá Atlantsflog til nr. 1, 2 og 3 hjá kvinnum og monnum í marathon. Lutakast verður millum allar luttakarar um flogseðlar frá Atlantsflog o.ø. Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2, og 3 í øllum bólkum. Føroya Sparikassi letur gávukort um nýtt rutumet verður sett hjá kvinnum og monnum í marathon.

### Drykkjuvørur og fyrstahjálp

Á rutuni ber til at fáa vatn og saft fyri hvørjar 5 km. Eisini verða fyrstahjálparar til reiðar á rutuni. Í máløkinum verða eisini drykkjuvørur og annað gott at fáa.

### Bólkar

| | | |
|---|---|---|
| **Marathon Menn** | | |
| 1. Bólkur | 18-39 | Føddir 1965-1986 |
| 2. Bólkur | 40-49 | Føddir 1955-1964 |
| 3. Bólkur | 50+ | Føddir 1954 ella fyrr |
| **Marathon Kvinnur** | | |
| 1. Bólkur | 18-39 | Føddar 1965-1986 |
| 2. Bólkur | 40+ | Føddar 1964 ella fyrr |
| **Hálvmarathon Menn** | | |
| 1. Bólkur | 18-39 | Føddir 1965-1988 |
| 2. Bólkur | 40+ | Føddir 1964 ella fyrr |
| **Hálvmarathon Kvinnur** | | |
| 1. Bólkur | 18-39 | Føddar 1965-1988 |
| 2. Bólkur | 40+ | Føddar 1964 ella fyrr |
| **5,8 km Menn** | | |
| Ein Bólkur | 13+ | Føddir 1991 ella fyrr |
| **5,8 km Kvinnur** | | |
| Ein Bólkur | 13+ | Føddar 1991 ella fyrr |
| **3 km Dreingir** | | |
| Ein Bólkur | -12 | Føddir 1992 ella seinni *Mælt verður til, at foreldur renna við børnum, ið eru yngri enn 7 ár.* |
| **3 km Gentur** | | |
| Ein Bólkur | -12 | Føddar 1992 ella seinni *Mælt verður til, at foreldur renna við børnum, ið eru yngri enn 7 ár.* |

# KÍ og Liverpool Fótbóltsskúli í Klaksvík

**Nýggjur og spennandi fótbóltsskúli verður í Klaksvík, í døgunum 3. til 5. august.**

Nú Klaksvíkar Ítróttarfelag gerst 100 ár, skipar KÍ fyri einum serstøkum fótbóltsskúla. Hesin fótbóltsskúli verður í ár gjørdur í samstarvi við stórfelagið Liverpool FC í Onglandi. Andy Knottyash, ið er venjari á Akademinum hjá Liverpool FC, vitjar KÍ frá 2. til 9. august. Í hesum tíðarskeiði skal hann standa fyri fótbóltsskúlanum, umframt at hann skal hava skeið við venjarunum hjá KÍ.

Fótbóltsskúlin verður skipaður eins og venjingarnar á Akademinum hjá Liverpool. Umframt høvðusvenjaran Andy Knottyash verða aðrir góðir venjarar knýttir at skúlanum. Eitt nú verður serstøk málmansvenjing við landsliðsmálverjanum Jákupi Mikkelsen.

Høvðusstuðlar fyri skúlan er: Atlantic Airways og Norðoya Sparikassi.

Fótbóltsskúlin er fyri gentur og dreingir í aldrinum frá 10 til 16 ár (árg. 1988-1994). Tað eru bert pláss fyri 150 luttakarum, og tískil er umráðandi at tekna seg sum skjótast. Kostnaðurin er 500 krónur fyri hvønn, og íroknað prísin er venjing, t-shirt, og døgurði.

Tilmelding fer fram á tlf. 456184 mikukvøldið 23. juni og hóskvøldið 24. juni millum 18-20, og kostnaðurin á 500 krónur skal rindast á konto: 9865-185.091.6 áðrenn 1. juli.



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Deildarleiðari til psykatriska Deild 1

Starvið sum deildarleiðari á Deild 1 á Landssjúkrahúsinum er leyst at søkja til setan 1. august 2004 ella eftir avtalu.

Deildin er ein opin 5-daga psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Vit arbeiða tvørfakligt á einum høgum fakligum støði við nýggjastu terapihættunum. Arbeiðsumhvørvið er áhugavert og hevur nógvar avbjóðingar.

Deildarleiðarin hevur við tilvísing til leiðandi sjúkraróktarfrøðinginum á psyk.deplinum ábyrgdina av sjúkrarøktini, starvsfólkaleiðslu og menning av deildini.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- prógv og royndir innan leiðslu, psykiatriska eftirútbúgving ella líknandi. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava ætlanir um víðariútbúgving, kunnu eisini søkja
- hollar royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
- hava ætlanir um frálæru og menning av starvsfólkunum
- góð samstarvsevni
- skal verða sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at ringja telefon 304500 til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102 - e-postur bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er mánadagin 12. juli 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

Sosialurin
-tað loysir seg

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

## Reingerðarfólk

Fyri starvsfólk, ið fer í farloyvi, verður lýst eftir fólki at gera reint á Løgmansskrivstovuni frá 1. juli til 31. desember 2004.

Talan er í fyrsta lagi um alla reingerð í Sjóð- og Vektarbúðini.

Tann, ið settur verður, skal vera røkin, álítandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Arbeiðstíðin er sett til 15 tímar um vikuna og er vanliga eftir kl. 16 yrkadagar.

Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at ringja á fartlf. 211410, fyri at hoyra nærri um starvið.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmansskrivstovuni**
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 29. juni 2004 kl. 15.00.

## Tvøroyrar skúli

Vegna farloyvi, lækkað tímatal, avlopstímar og næmingar við serligum tørvi verða hesi lærarastørv lýst leys at søkja.

- 2 fulltíðarstørv
- 1 starv 15-20 t./v.
- 1 starv sum sergreinalærari at undirvísa 4 t./v. í tónleiki

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið og eru tíðaravmarkaði til skúlaárið 2004/2005.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juni 2004.

**Skúlastýrið fyri Tvøroyrar skúla**
v/ Chris Jan Michelsen
FO-800 Tvøroyri

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrarøktarfrøðingur

Fast heiltíðarstarv í skiftandi vaktum sum sjúkrarøktarfrøðingur er leyst at søkja á **E3/E2** til setan 15. juli 2004 ella eftir avtalu.

E3 er ein medisinsk deild, við 7 seingjarplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við des. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan viðgerð og røkt av apoplexi sjúklingum
- fakligan áhuga innan eldrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- góða upplæring
- eitt umhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna sjúkrarøktina.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja tlf. 304500 Monicu Brickman deildarleiðara, lokal 6012, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 12. juli 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt **»umsókn til starv«** við avriti av prógvum, CV, autorisatión og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

BADEFERIE FOR HELE FAMILIEN VED DET SYDLIGE ADIATERHAVSKYST
*Også kaldet det "Caribiske Italien"*

**LAST MINUTE: Den 26. juni 2004 : 2.550 kr. pr. person**
Inkl- Fly Atlantic Fra København til Italien t/r samt 1 uge i mobilhome-Bungalow/Lejlighed
Ikke inkluderet Lufthavnsskatter 285 kr. samt transporten til København
Flyplus hjælper gerne med billige tilslutningsfly samt evt. ophold i København
**Exstra Uge:** 1.250 kr. pr. person.
Den 3. juli: 2.995 kr. den 10. juli:3.490 kr. (kun få pladser) 24. juli: 3.490 kr.
Aug.og sep.: få tilbud!
**Tilmelding flyplus@flyplus.dk tlf.: 0045 63 13 03 03**
www.FlyPlus.dk